# AGA- & ETISKANEVNDIN

**KÆRA 9/2024**

| | |
|---|---|
| ***FSF-skrivstovan upplýsir Aganevndini:*** | |
| **Málsheitið: FC Hoyvik kærir HB fyri brúk av ólógligum leikarum vegna vantandi yvirsiting í sambandi við upp- og niðurflyting millum deildir, a og b lið, U15 dreingir** | |
| Deild: U15 Dreingir | Hvør hevur reist málið: FC Hoyvík |
| Kapping: Landskapping | Nevndin móttikið kæru: 21. okt. |
| Møguligt brot framt: 5.10.2024 | Kærugjald goldið: Ja |
| Partshoyring: Ja | 5 daga kærufreist hildin: Ja |
| Áheitan um munnliga viðgerð: Nei | Starvsnevndarummæli: Ongar viðmerkingar |

## Úrskurður

Staðfest er, at HB hevur brotið grein 8, stk. 6 í kappingarreglunum fyri fótbólt, eftirsum 6 leikarar leiktu við HB b 5.10.2024, hóast teir 27.9.2024 leiktu við HB a, uttan at hava yvirsitið ein dyst í millumbilinum.

At gera brúk av ólógligum leikara er álvarsamt brot á regluverk FSF's.

Aga- og etiskanevndin hevur tí avgjørt, ***at revsa***

- **HB U15 lið b** við at tapa dystin móti FC Hoyvík leiktur 5.10.2024 við málmuninum 0-3 fyri brúk av 6 ólógligum leikarum. Tapið við málmuninum 0-3 er ásett við heimild í § 6, bókstav g í 3. reglubroti í Aga- og etisku reglugerðini og samsvarandi grein 41 í Kappingarreglunum fyri fótbólt.

Av tí at talan er um leikarar undir 18 ára aldur, verða teir ikki nevndir við navni í hesi avgerð.

Úrskurðurin um, at HB U15 lið b er dømt at tapa dystin, kann kærast til Yvirkærunevndina. Freistin at kæra er 5 dagar.

## Kæran, partshoyringin og møguligt Starvsnevndarummæli

FC Hoyvík kærir HB fyri brúk av fleiri ólógligum leikum til dystin hjá U15 b, sum varð leiktur 5. oktober. Dysturin endaði við javnleiki 3-3.

HB hevur ikki gjørt partsviðmerkingar til kæruna.

## Heimildir hjá Aganevndini at viðgera málið

Vísandi til grein 2, 3, 4 og 5 í Aga- og etisku reglugerðini hjá FSF, hevur Aga- og Etiskanevndin málsføri at viðgera hetta mál.

## Fakta í málinum

Skrivstovan hjá FSF hevur upplýst og eftirkannað leikaraskrásetingarnar á dómaraseðlunum.

Staðfestast kann, at HB b hevur brúkt 6 ólógligar leikarar, sum í dysti frammanundan leiktu við a-liðnum.

## Lógarverkið

# AGA- & ETISKANEVNDIN

| |
|---|
| Kappingarreglurnar fyri fótbólt áseta í grein 8, stk. 1 og stk. 6 reglur við treytum fyri at flyta úr hægri deild niður í lægri deild at leika. Reglurnar um flyting millum deildir eisini galdandi fyri a og b lið í somu deild.<br><br>Sambært § 6 í Aga- og etisku reglugerðini, kunnu persónar og feløg verða dømd agarevsing fyri brot á fótbóltsregluverkið. |
| **Staðfestingar, metingar og niðurstøða** |
| Aga- og etiskanevndin staðfestir, at tað er próvfast, at seks U15 HB leikarar fluttu niður frá HB a U15 Dreingir, at spæla við lægri deild, tvs. HB b U15 Dreingir, uttan at hava yvirsitið dyst.<br><br>HB b verður sambært § 6, stk. 3, bókstav g í Aga- og etisku reglugerðini dømt til at tapa dystin móti FC Hoyvík við málmuninum 0-3 fyri brúk av fleiri ólógligum leikarum, sum ikki hava yvirsitið dyst eftir at hava leikað við a-liðnum frammanundan. |
| **Kæruvegleiðing** |
| Sambært grein 10, litra f í aga- og etisku reglugerðini, kann úrskurðurin um at HB b tapir dystin, kærast til Yvirkærunevndina innan 5 dagar eftir, at úrskurðurin er móttikin. |
| **Staður, dagfesting og undirskrift:**<br><br>**Tórshavn 1. november 2024**<br><br>Anni á Hædd<br>Anni á Hædd<br>forkvinna |
| Í Aga- og etiskunevndini eru: Anni á Hædd, forkvinna og løgfrøðingur, Eli Thorsteinsson, næstformaður og løgfrøðingur, Ken Nónklett, løgfrøðingur, Jóhan T. Davidsen, løgfrøðingur og Sissal Kj. Kristiansen, sniðgevi og ráðgevi. |